# Fimm teir bestu filmarnir seinasta árið

**Ein góður filmur hevur nógv at gera við karmarnar hann verður sæddur undir. Tí skal ein filmur síggjast í biografinum, sigur Martin Nolsøe Simonsen. Hann heldur, at ein góður filmur skal nema við kenslurnar, sleppa innum á onkran hátt**

Niels Uni Dam
nielsuni@sosialurin.fo

Martin Nolsøe Simonsen er ein av teimum fáu føroyingunum í filmídnaðinum. Ungi havnarmaðurin lesur film- og miðlavísund á Københavns Universitet. Men seinnu árini hevur hann fingist líka nógv við film- og sjónvarpsarbeiðið, sum hann hevur lisið. Hann hevur m.a. arbeitt fyri DR og Zentropa og hevur verið við í framleiðslum hjá Lars Von Trier og Peter Gantzler. Umframt hetta hevur Martin gjørt stuttfilmar, dokumentarfilmar og informationsfilmar.

## Trier snorkaði

Martin fortelur, at einaferð undir arbeiðinum við "Manderlay" kom Lars Von Trier inn á skrivstovuna, har Martin arbeiddi. Martin hevði stutt áðrenn tosað við onkran annan á filmsettinum um, at hann hevði onkra teoretiska vitan um ræðslu, sum var rættiliga áhugaverd. Eftirsum Trier arbeiddi við ræðslu júst tá, so helt Martin, at filmstjórin kanska var komin inn at práta um hetta. Men so var ikki Trier spurdi, um hann kundi leggja seg á sofuna á skrivstovuni, at fáa sær ein lúr. Tí hann skuldi út um kvøldið og vildi fáa eitt sindur av hvíld áðrenn. So har lá tann størsti danski filmstjórin og vendi reyv móti Martini og snorkaði. "Hetta er mítt tættasta samstarv við ein stóran filmstjóra higartil" flennir Martin.

## Tann heilt rætta útbúgvingin

Martin sigur, at sjónleikur og filmur fangaði hansara áhuga, meðan hann var rættiliga ungur, og hann royndi sum 19 ára gamal at sleppa inn á filmskúlan, men slapp ikki inn. Hann søkti ongantíð aftur, tí við tíðini metti hann ikki filmskúlan vera tí røttu útbúgvingina.

Hann søkti síðan inn á miðlavísund í Århus. Men varnaðist so film- og miðlavísund í Keypmannahavn, og helt hesa útbúgving verða heilt tí røttu, tí hon virkar sum eitt bindilið millum film og aðrar miðlar.

## Ein góður filmur

Planet.fo hevur biðið Martin um at velja fimm teir bestu filmarnar, sum eru komnir í biograf og á DVD seinasta árið. "Ein góður filmur er betingaður av karmunum, og skal upplivast í einum biografi. Upplivingin er ávirkað av hvørjar umstøðurnar eru, tá tú sært hann, um tú ert í góðum lag, hvørjum tú ert saman við, og nógvir aðrir faktorar spæla inn" sigur Martin, men heldur samstundis, at nakrir filmstjórar duga so væl, at karmarnir gerast góðir av filminum: "Ein góður filmur sleppur innum á onkran hátt, og nemur við mínar kenslur. Hann fær meg at hugsa, tá eg komið út úr biografinum, og kanska broytur hann mína áskoðan á menniskju."

## Hatar Hollywood

80% av teimum filmunum sum Martin sær eru Hollywood filmar, men hann sigur seg hata Hollywood. "Við øllum teimum nógvu pengunum stýrir Hollywood, hvørjir filmar koma fram, og hvat biografarnir vísa. Hetta, at tey við pengum bestemma, er for býtt, for naivt og for yvirfladiskt." heldur Martin.

## Finding Neverland

**filmstjóri: Marc Forster**




Løtan eg sá Finding Neverland, hevur uttan iva spælt inn. Eg sá filmin saman við góðum vinum, í góðum veðri í einum útibiografi á Søndermarken. Filmurin rakti meg hart. Johnny Depp er besti sjónleikari, sum arbeiðir við Hollywood filmum. Søgan er um at fortelja søgur, og um hvussu viktigt tað er at droyma. Tí hvørji eru vit uttan dreymar. Hetta er ein filmur, sum fortelur viktig ting um lívið, um hvussu sárbær vit eru, og um hvussu vit við at droyma finna styrkið

## Sin City,

**filmstjórar: Frank Miller (II) og Quentin Tarrantino**




Hetta er ein feitur filmur, sum er bæði kul og harður. Filmurin hevur eina feita rútmu. Litirnir eru fantastiskir, ein øgiliga grafiskur filmur, og bara annarleiðis. Mær hevur altíð dámt væl tekniseriur, og hetta er ein tekniseria. Sjálv søgan er ikki serliga góð. Men filmurin riggar ordiliga væl í einum biografi. Eg visti slettis ikki, hvat eg skuldi vænta, tá eg fór til hann. Men Mickey Rourke var so harður og kontantur, at eg varð drigin inn í filmsins univers.

## The Incredibles

**filmstjóri: Brad Bird**




Ein genta segði, at eg mátti síggja "The Incredibles". Eg hugsaði, "whatever - enn ein teknifilmur" Eg elski Lion King, Beauty and the Beast, og Alladin. Men eg haldi, at Disney er farið út á eitt síðuspor. Men handan gentan bleiv við. So eg hugdi, at honum. Pínadoyð hann er gjøgnumførdur. Eg ynskti mær altíð, at verða superhetja sum barn, tí var søgan løtt at liva seg inn í. Men harafturat eru figurarnir so væl gjørdir, teir eru meira livandi enn vanlig menniskju.

## Lemony Snicket's: a series of unfurtunate events

**filmstjóri: Brad Silberling**




Jim Carrey er ein leikari, ið eg hati og elski. Hann spælir høvuðsleikslutin í hesum filminum. Filmurin hevur tað mest fantastiska samanspælið av litum og ljóði. Tað er, sum hvør sena er ein málningur - tað er heilt fantastisk. Man skuldi hildið, at hetta var ein Tim Burton filmur. Søgan er eisini øgiliga góð og øgilig ólukkulig. Samanumtikið ein heilt ótrúliga góður filmur.

## Eternal sunshine on a spotless mind




Enn ein filmur við Jim Carrey, og hóast mær einki dámar Jim Carrey, so elski eg hann í báðum hesum filmunum. Filmurin hevur eina ótrúliga góða filosofi. Søgan er góð, spennandi og innihaldsrík. Øll, sum síggja hendan filmin, áttu at hugsað um lívið. Handritið er skrivað av Charlie Kaufman, sum eisini skrivaði "Being John Malkovich". Hann skrivar forferdiliga løgnar filmar.